# S A M S T A R V S A V T A L A

**um umhvørviseftirlit við skipum og bátum**

**millum**

**Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Umhvørvismálaráðið**

**vegna**

**Vørn, Sjóvinnustýrið og Umhvørvisstovuna**

## 1. Felags áhugamál

Ásannandi **at** málsøkini havumhvørvisvernd, trygd og eftirlit á sjónum eru tætt tengd hvør at øðrum tá um ræður at seta rakstrarkrøv og tøknilig krøv til skip og bátar fyri at tryggja eitt reint havumhvørvi eins og trygga sjóferð, og vísandi til, **at** landsstýrið hevur eina felags maritima strategi[1] fyri implementering og handhevjan av altjóða regluverkinum hjá IMO, eru landsstýrisfólkini samd um:

## 2. Samstarvsøki

Samstarv um umhvørviseftirlit verður skipað innan karmarnar av lógini um trygd á sjónum og lógini um verju av havumhvørvinum, soleiðis at Vørn, Sjóvinnustýrið og Umhvørvisstovan, hvør sær og saman, verða heimilað at útinna umhvørviseftirlit sambært galdandi lógarverki og hesi avtalu.

Samstarvið fevnir um umhvørviseftirlit við føroyskum og útlendskum skipum og bátum[2], sum eru í føroyskum altjóða sjógvi, á føroyska sjóumveldinum og sum koma í føroyska havn.

## 3. Umhvørviseftirlit

**Sjóvinnustýrið** fremur eftirlit við,
**3.1** ***at*** skip og bátar hava góðkendar skipanir umborð til burturbeining av olju, matburturkasti, kloakkspillivatni og viðgerð av barlastaravatni og sót, SOx.

**Vørn** fremur eftirlit við,
**3.2** ***at*** burturkast, olja, óviðgjørt kloakkspillivatn, óviðgjørt barlastarvatn, kemikaliur umframt evni og tilfar ikki ólógliga verða burturbeind í havið, og
**3.3** ***at*** goymslurúm ella tangar eru umborð til burturkast, olju, óviðgjørt kloakkspillivatn, óviðgjørt barlastarvatn, kemikaliur umframt evni og tilfar.

**Umhvørvisstovan** fremur eftirlit við,
**3.4** ***at*** avhendan av burturkasti, olju, kloakkspillivatni, óviðgjørdum barlastarvatni, kemikalium umframt av evnum og tilfari, er sambært reglum um móttøkuskipanir á landi.

---

[1] Strategic Framework for IMO 2023-2033.
[2] Eftirlitið fevnir eisini um skip og bátar undir 24 m í longd og sum ikki eru fevnd av klassakrøvum.

Tá nýggj ella broytt umhvørviskrøv frá IMO skulu setast í verk, tekur Umhvørvisstovan stig til samstarv og skipan av eftirlitinum partanna millum, sí eisini punkt 6.

## 4. Handhevjan og rættarsókn

Staðfestir Vørn ivasom ella ólóglig viðurskifti í skipanum umborð ella ólógliga burturbeining í havið, verður skjótast gjørligt boðað frá til ávikavist Sjóvinnustýrið ella Umhvørvisstovuna. Sjóvinnustýrið boðar Umhvørvisstovuni frá málum um staðfest brot á havumhvørvislóggávu í sambandi við klassaeftirlit og Port State Control.

Umhvørvisstovan tekur í samráð við ávikavist Vørn og Sjóvinnustýrið støðu til og avgerð um, hvussu farast skal víðari við málum um møgulig og staðfest lógarbrot á regluverkið.

Partarnir kunna hvønn annan um mál, ið vera handfarin antin sum fyrisitingarlig sektaruppskot ella latin løgregluni til rættarsókn.

## 5. Umhvørvisráðgeving

Umhvørvisstovan ráðgevur Sjóvinnustýrinum og Vørn í spurningum um tulking av havumhvørvislóggávuni, umsiting, eftirlitsheimildir o.til.

Umhvørvisstovan gevur, eftir tørvi, starvsfólkum á Vørn og manningum umborð á eftirlits-skipunum, fakliga kunning um regluverkið, ið hevur týdning fyri umhvørviseftirlitið eftir hesi avtalu.

## 6. Árligur samstarvsfundur

Á hvørjum ári í apríl mánað er samstarvsfundur partanna millum. Umhvørvisstovan kallar inn.

Allir partar kunnu skjóta upp mál og evni at viðgera á samstarvsfundinum. Eisini kunnu spurningar og ivamál um hesa avtalu, tulking av lógar- og kunngerðakrøvum, gerð av eftirlitslistum, útinnan av eftirlitinum, úrslit av eftirlitinum, mannagongdir og tílíkt viðgerast eftir tørvi. Umhvørvisstovan hevur ábyrgd av, at slík skjøl regluliga verða eftirmett og dagførd.

## 7. Stýrandi skjøl

Gerast kunnu skjøl við tilvísing til hesa samstarvsavtalu, sum ítøkiliga lýsa eftirlitslistar, yvirlit yvir ábyrgdarfólk, mannagongdir, o.a., sum er týðandi fyri útinnan av umhvørviseftirlitinum og handhevjan av staðfestum brotum o.tíl.

## 8. Gildiskoma

Samstarvsavtalan kemur í gildi 22. mai 2024 og kann, eftir áheitan frá ein av pørtunum, takast upp til endurskoðan.

**Tórshavn 21. mai 2024**

| Landsstýrisfólki í fiskivinnu- og samferðslumálum | Landsstýrisfólki í umhvørvis-málum | Landsstýrisfólki í Uttanríkis- og vinnumálum |
|---|---|---|
| *Dennis Holm* | *Ingilín D. Strøm* | *Høgni Hoydal* |